# STAND UP UNITED

## VERJULEIKARAR Á ALTJÓÐA MANNARÆTTINDALIÐNUM

RÓPIÐ Á LIÐIÐ WWW.AMNESTY.FO

### MEKSIKO
**ALEJANDRO SOLALINDE**

Alejandro Solalinde er katólskur prestur. Hann brúkar stóran part av lívi sínum til at arbeiða fyri korunum hjá flóttafólki. Brotsmannabólkar og lokalir myndugleikar hava hótt hann fyri arbeiðið, hann ger, men hóttanirnar hava ikki steðgað honum.

VERJULEIKARI

### PERU
**CLAUDIA LEMA**

Claudia Lema arbeiðir fyri at minka um talið á teimum kvinnum, sum púra óneyðugt doyggja í barsilsong. Hon stuðlar av fullum huga kvinnum í at leggja trýst á myndugleikarnar fyri at fáa teir at tryggja, at eisini hesar kvinnurnar fáa heilsutrygd.

VERJULEIKARI

### SERBIA
**NATAŠA KANDIC**

Nataša Kandic er løgfrøðingur. Hon arbeiðir fyri teimum, sum vóru fyri krígsbrotsgerðum, sum serbiskar herdeildir framdu í fyrrverandi Jugoslavia í 1990árunum. Sjálvt um hon er álopin og hótt, heldur hon fram við at leita eftir sannleikanum og at berjast fyri rættvísi fyri tey, sum yvirlivdu.

VERJULEIKARI

### ÍSRAEL / HERSETTA PALESTINSKA ØKID
**HAJ SAMI**

Haj Sami Sadeq er palestinskur aktivistur, sum arbeiðir í bygdini Aqaba í hersettu økjunum á Vestara áarbakka. Hóast ísraelskir myndugleikar hava rivið nógvar av bygningunum í bygdini niður, hevur hansara ágrýtni verið við til at gjørt, at tað hevur borið til at menna Aqada til eitt blómandi øki við nýggjum møguleikum, teirra millum ein barnagarður og ein læknastova.

VERJULEIKARI

### IRAN
**SHADI SADR**

Shadi Sadr er løgfrøðingur, sum hevur vart kvinnur, sum eru dømdar til deyða, teirra millum er fleiri, sum eru dømdar at steinast. Hon hevur góð úrslit at vísa á. Hon hevur verið tvungin til at rýma úr sínum heimlandi, tí hon sum tíðindakvinna og aktivistur hevur stríðst fyri kvinnurættindum.

### RUSSLAND
**MUKHMED GAZDIEV**

Sonur Mukhmed Gazdiev, Ibragim, var eftir øllum at døma tikin av vápnaðum monnum í russiska lýðveldinum Ingushetia í 2007. Sjálvt um Mukhmed hevur vánaliga heilsu, so stríðist hann uttan íhald fyri at finna sonin aftur. Somuleiðis arbeidir hann fyri at varpa ljós á tann leiklutin, sum stjórnin hevur í hvørvingunum

VERJULEIKARI

### KINA (TIBET)
**DHONDUP WANGCHEN**

Dhondup Wangchen er samvitskufangi, sum hevur verið fongslaður síðan 2008, tá ið kinesiska løgreglan handtók hann. Hann situr í fongsli fyri at hava gjørt dokumentarfilmin Leaving Fear Behind, sum lýsir tibetanskar áskoðanir um Olympisku leikirnar í Beijing, mannarættindi og Dalai Lama.

VERJULEIKARI

### KAMERUN
**JOEL NANA**

Joel Nana arbeiðir fyri rættindunum hjá samkyntum, tvíkyntum og "transgender" fólki í Afrika. Sjálvt um hann verður plágaður og hóttur, so heldur hann fram við at arbeiða við at upplýsa um HIV/AIDS, eins og hann arbeiðir fyri rættindum til heilsutrygd og javnrættindi.

VERJULEIKARI

### SUÐURAFRIKA
**'P' (DULNEVND)**

P er aktivistur, sum arbeiðir saman vid fátøkum kvinnum, sum hava verið úti fyri harðskapi í heiminum ella hava fingið HIV. Hon hjálpir við praktiskum uppgávum, og við tolni og dirvi setur hon spurnartekin við neiligu áskoðanirnar um kvinnur í suðurafrikanska samfelagnum.

VERJULEIKARI

### KENYA
**WILTER NYABATE**

Wilter Nyabate býr í Kibera, sum er eitt stórt slumøki í Nairobi. Økið er partur av verkætlan hjá stjórnini, sum hevur til endamáls at geva íbúgvunum betri bústaðir. Hennara mál er, at íbúgvararnir verða hoyrdir, og at bústaðarviðurskiftini eru nøktandi.

VERJULEIKARI

### PAKISTAN
**AMINA JANJUA**

Maður Aminu JanJua hvarv í 2005. Hildið verður, at hann situr í varðhaldi. Amina JanJua stríðist fyri at finna út av, hvat hendi. Hon leggur trýst á myndugleikarnar fyri at fáa sannleikan at vita um lagnuna hjá manni sínum og hundratals øðrum fólkum, sum eisini eru horvin.

VERJULEIKARI

AMNESTY INTERNATIONAL

11 VERJAR
11 ÁTØK
1 MÁL

April 2010. Index ACT 30/002/2010.

Photo credits clockwise from top:
© Amnesty International, © Rebuilding Alliance,
© www.kosoof.com, © Amnesty International,
© Filming for Tibet, © Private,
© Amnesty International, © Amnesty International,
© Candice Feit/WPN, © Salud Sin Limites,
© Martha Izquierdo